## ... um Skálafjarðartunnilin

Eg gleði meg til Skálafjarðartunnilin gerst veruleiki. Hann fer at gagna øllum landinum. Eg vóni tó, at hann í størstan mun verður gjørdur við fyriliti fyri vøkru náttúruni við Toftavatn.



## ... um enskan fótbólt

Eg dyrki enskan fótbólt. Mín fyrsti kærleiki innan ítróttarheimin var legendariska liðið hjá Nottingham Forest. Men nú eru teir í League One. Meðan eg bíði eftir, at Forest kemur upp aftur, so haldi eg við Newcastle United.

# ÍSF-forsetasessin



*Sølvi Reinert Hansen ætlar sær at gerast forseti í Ítróttarsambandi Føroya, men hann vil hava onkran at kappast við um sessin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

og í Gotlandi í 1999. Hann hevur havt 800 metra-teinin, sum sína sergrein. Á Oyggjaleikunum á Álandi varð hann eisini við á liðnum, sum rann 4 x 400 metrar. Sølvi hevur silvur og bronsukrónur frá FM-kappingum, men ongar gullkrónur. Tá hann kom heim eftir loknan lestur í Odense, í 1995, byrjaði hann at skipa fyri rennikappingum á Skálafjørðinum. Hetta virksemi legði lunnar undir, at rennifelagið "Roysnið" var stovnað í 1998. "Treystið" í Norðoyggjum var eisini stovnað hetta árið. Sølvi hevur verið formaður í Roysninum síðani stovnan. Í 1998 var deildarsambandið fyri Frælsan Ítrótt og súkkling stovnað. Hjalti Gunnarsstein var formaður fyrsta árið. Hann flutti til Danmarkar í 1999, og tá gjørdist Sølvi formaður í Deildarsambandinum. Hann røkti formanssessin fram til 2002. Í 2002 fekk Frælsi Ítrótturin egið sersamband, og gjørdist Sølvi fyrsti formaður tess. Hann var formaður í Sersambandinum fyri frælsan ítrótt, fram til 2006.

### Ítróttarráðgevi

Í 2002 varð Sølvi settur í tað nýuppræettaða starvið, sum ítróttarráðgevi hjá ÍSF. Hetta starvið røkti Sølvi í 5 ár. Ein part av hesum tíðarskeiðnum (2003-2005) varð Sølvi formaður í Oyggjaleikanevndini. Í dag tekur starvsnevndin og umsitingini hjá ÍSF sær av hesum arbeiðnum. Ein partur av arbeiðstíðini hjá Sølva fór til altjóða samskiftið. Oyggjaleikirnir hava sín árliga aðalfund, og er eisini nógv at fyriskipa í samband við Oyggjaleikirnar. 150 ítróttarfólk, venjarar og leiðarar skulu hava innivist. Sølvi hevði eisini nógv samband við felagsskapin "European Non Governmental Sports Organization", stytt ENGSO. Har knýtti Sølvi vinarbond við Patrick Hickey, sum nú er formaður í tí evropeiska olympisku nevndini, EOC. Sølvi og Petur Elias Petersen vóru á aðalfundi hjá EOC í Dublin 2005, og í Bruxelles í 2006.

### Rogge á fundi

Millum prominentu gestirnar á EOC-aðalfundinum í Dublin, varð IOC-forsetin, Jacques Rogge. Rogge stirnaði tá hann tók í hondina á báðum teimum føroysku umboðunum. Týðiligt var, at Rogge ikki líkaði hesa løtuna. Sølvi er ikki so bjartskygdur um olympisku viðurkenningina hjá Føroyum. IOC fekk harðar, knívskornar reglugerðir í 1992. Og tað verður ringt hjá Føroyum at koma inn í tað lovaða olympiska landið, sum "Atland" ella "Landslutur". Ikki tí, øll sum varða av ítróttini í Føroyum ynska at Føroyar fáa hesa viðurkenning. Eingin ivi um tað. Men starvsnevndin hjá IOC, og Jacques Rogge hava higartil noktað at hava fund við føroysk umboð um hetta málið. Nýggju leiðarnir í IOC ynska eisini at vísa seg, sum rættar menn, sum "halda reglugerðirnar", og ikki taka ímóti mutri. Og lítil ivi er um, at Føroyar í IOC-høpi verða síðustillaðar við Katalania, og tey ymisku autonomu økini í Russlandi.

### Rættarmálið hjá Gibraltar

Gibraltar, sum saman við Føroyum eru einasta landið, sum hevur sent eina umsókn inn til IOC - áðrenn broyttu viðtøkurnar í 1992 – hevur drigið IOC til Evropeiska Ítróttardómstólin. Sølvi hevur havt nógv av samskiftunum við fólkini frá Gibraltar, og hevur ÍSF bjóðað Gibraltar at føra sak saman við teimum. Men Gibraltar hevur ynskt at føra rættarmálið sjálvir. "Um Gibraltar vinnur, so verða vit og teir óiva tiknir uppí IOC. Men hvørki vit ella Gibraltar eiga trygd fyri, at ein meiriluti av limalondunum ikki sparkar okkum út aftur til næsta aðalfund aftur! Vit hava bara fingið eina altjóða viðurkenning innan ítróttina síðstu árini, og tað er innan bogaskjótingina. Atlond fáa ikki altjóða viðurkenningar, sum støðan er í heiminum, í løtuni."

Tað ergrar Sølva, at Føroyar ikki hava olympisku viðurkenningina. Olympiska viðurkenningin hevði eisini givið føroyskum ítróttarfólkum atgongd til evropeisku smátjóðaleikirnar, og til evropeisku ungdómsleikirnar, ið nevnast "European Youth Olympic Festival". Ísland fær uml. 4 miljónir kr. frá IOC um árið. Hetta hevði eisini kunna fallið Føroyum í lut. Sølvi fær nógv at síggja til, um hann gerst komandi ÍSF-forsetin. Men hann ætlar sær at fara undir uppgávuna við góðum treysti. Men sum ein góður ítróttarmaður ynskir hann ikki at vinna uttan dyst. Vónandi kemur ein mótleikari inn á vøllin?

## Fakta

**Navn:** Sølvi Reinert Hansen
**Føddur:** 8. september 1970
**Bústaður:** Saltangará
**Giftur:** Biritu úr Runavík
**Barn:** Betuel, 10 ár
**Hundur:** Napoleon (langhærdur miniature gravhundur) 3,5 ár
**Útbúgving:** Matematiskur studentur frá Gøtugjógv í 1989, lisið Søgu, Samtíðarsøgu og Norðurlendskt (Fróðskaparsetrið og Odense Universitet, 1990-95). Er í gongd við Masterútbúgving í Ítrótti og Vælferð (Københavns Universitet)
**Feløg:** B68, NSÍ-kappróður og Roysnið